## Úr grannalondum

Lagt til rættis: Árni Joensen

# Um 30 ár standa kirkjurnar tómar

**Bara sjey prosent av kirkjufólkinum í Noregi eru í kirkju eina ferð ella meiri enn eina ferð um mánaðin, og talið minkar so skjótt, at hendir einki munagott, fara kirkjurnar at standa tómar sunnudag longu innan 30 ár**

Munandi færri norsk børn verða doypt í kirkjuni, munandi færri ung verða fermd, og støðugt fleiri vaksin velja at fara úr kirkjuni til aðrar átrúnaðarligar bólkar ella felagsskapir. Samstundis siga støðugt fleiri, at tey trúgva als ikki, at Guð er til.

Hetta er nakað av tí, sum kom burtur úr einari kanning, sum granskarin Pål Ketil Botvar hevur gjørt fyri norsku kirkjuna. við hagtølum frá kirkjunum er hann komin eftir, at parturin av kirkjufólkinum, sum ganga í kirkju regluliga, er minkaður úr 11 í 7 prosent, og at tey, sum verða doypt í kirkjuni, eru fækkað úr 81 prosentum í 1999 í 68 prosent í 2009.



*Tað er gott pláss til guðstænastuna í Vålerengen-kirkju ein vanligan sunnudag*
Mynd: Aftenposten

81 prosent av norska fólkinum eru skrásett sum kirkjufólk, men av teimum 20 til 30 ára gomlu eru tað bara 72 prosent, sum hoyra til kirkjuna. Eitt heldur óvæntað úrslit var kortini, at tað er ikki bara tað yngra ættarliðið, sum vendir kirkjuni bakið. Tvørturímóti eru tað tey millum 55 og 65 ár, sum ganga undan í so máta, skrivar Aftenposten.

Pål Ketil Botvar heldur kortini, at norska kirkjan hevur fleiri møguleikar at fáa fólk at støðast. Men so er neyðugt at endurskoða guðstænastuna og sálmarnar, sigur hann. Granskarin ásannar tó, at tað er mark fyri, hvat kirkjan kann gera.

# Stórar bygnaðarbroytingar í grønlendsku fiskivinnuni

**Grønlendska fiskivinnulóggávan kemur nú á tingborð, tí landsstýrið hevur gjørt av at laga lóg og reglur soleiðis, at fiskivinnan verður burðardygg og til gagns fyri tann einstaka fiskimannin og samfelagsbúskapin**

Broytingarnar, sum landsstýriskvinnan Ane Hansen hevur lagt fram, skulu fremjast í tveimum umførum. Í fyrra umfari snýr tað seg um útróðrarflotan. Meginparturin av hesum flotanum er gamal og alt ov dýrur at halda, og tað forðar fyri, at vinnan er fíggjarliga burðardygg. Tí ætlar Ane Hansen at gera karmar fyri, at flotin verður endurnýggjaður, soleiðis at fiskimaðurin og samfelagið fáa gagn av honum, samstundis sum fiskastovnarnir verða gagnnýttir sum best.




*Grønlendski útróðrarflotin er gamal og dýrur at reka*
Mynd: KNR

Tað fer at kosta millum 600 og 700 milliónir krónur at endurnýggja útróðrarflotan, og landsstýriskvinnan ætlar, at tað privata skal í lummarnar eftir pengunum. Fyri at geva fleiri møguleikan at reka útróður ætlar landsstýriskvinnan at strika regluna, sum sigur, at fólk skulu hava havt fiskivinnu sum høvuðsvinnu í minst tvey ár fyri at fáa fiskiloyvi.

Tað fer sambært landsstýriskvinnuni at eggja landkrabbum til at gera íløgur í útróðurin. Vón hennara er, at privatir íleggjarar megna uppgávuna, og her hugsar hon bæði um einstaklingar, vinnufeløg, stovnar, pensjónskassar og onnur.

Gongst sum ætlað skal lógin um at endurnýggja útróðrarflotan avgreiðast í Landstinginum í vársetuni og koma í gildi 1. januar í 2012. So kemur næsta stig. Tá fer landsstýriskvinnan at leggja fram uppskot um eitt nú rættindi hjá útlendingum at eiga í grønlendsku fiskivinnuni, avreiðingarskyldu og býtið millum útróðurin og hin partin av fiskiflotanum.

## Fiskiskapurin sum í einum ævintýri



*Sigurbjørg og hinir íslendsku trolararnir hava havt rokfiskiskap eystanfyri*
Mynd: Morgunblaðið

Íslendskir trolarar hava havt sera góðan fiskiskap í Barentshavinum tær seinastu vikurnar. Eitt nú landaði Málmey 900 tons av toski og hýsu, sum teir høvdu fingið eftir 20 døgum, og sambært íslendsku bløðunum var fiskurin bæði stórur og góður.

Skiparin á einum øðrum íslendskum trolara, Sigurbjørg, letur væl at fiskarínum:

– Tað er ótrúligt, sum her er nóg av fáa. Á tí grunna fáa vit nógvan tosk, og á heldur størri dýpi er fult av hýsu, sigur Vilhjálmur Sigurðsson, skipari, við Morgunblaðið. Hann hevur roynt í Barentshavinum í fleiri ár og sigur, at tað er stórur munur á fiskinum har nú og fyrr. Tað er týðiligt, at fiskurin fær nógva føði, og íslendski skiparin vísir í hesum viðfangi á, at menn hava ikki fiskað loðnu eystanfyri tey seinastu árini.

– Eg havi ongantíð verið í so góðum fiskiskapi sum nú. Hetta er sum í einum ævintýri. Vit mugu ansa eftir, at vit ikki fáa ov nógvan fisk, sigur Vilhjálmur Sigurðsson.

## Kommunurnar spara



*Kommunurnar í Danmark ætla sær at brúka næstan fimm milliardir krónur minni í ár enn í 2009.*

Nógv tær flestu kommunurnar í Danmark ætla at brúka færri pengar í ár, enn tær gjørdu í 2009. Samanlagt eru útreiðslurnar á fíggjarætlanunum fyri 2011 knappar fimm milliardir krónur minni enn útreiðslurnar í roknskapunum fyri 2009.

Felagið hjá kommununum, Kommunernes Landsforening, sigur, at 84 av teimum 98 kommununum hava sett sær fyri at brúka minni í ár enn í 2009. Næstan 20 prosent av kommununum hava skert útreiðslurnar meiri enn fýra prosent, og níggju kommunustýri hava sett sær fyri at spara í minsta lagi seks prosent.

Formaðurin í danska kommunufelagnum, Jan Trøjborg, sigur, at kommunustýrini hava serliga lagt seg eftir at spara við at effektivisera, men hann leggur afturat, at tað slepst ikki uttanum, at sparingarnar fara at níva hjá borgarunum.